# MASKINMEISTARIN

Nr. 13 / Mars 2021




# Nonnufrensur gjørdist garvaður fakfelagsmaður



## Næmingatalið á Vinnuháskúlanum skal økjast



## Føroysku sáttmálarnir komnir til høldar



## Seks maskinmeistarar fingu prógv

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
Vanliga eru fýra útgávur um árið.

**Blaðnevnd**
Ólavur Gunnarsson, ábyrgd
Regin Olsen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda Maskinmeistaran, kunnu boða frá hesum í telduposti til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið;

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt. MASKINMEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
Pall J. Hansen, Ingibjørg Jacobsen
Símun Poulsen, Ingolf S. Olsen
Ólavur Gunnarsson, Ingolf S. Olsen
Prógvhandan, Maria Lava Jacobsen

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
502022

**Prent og liðugtgerð**
Føroyaprent
info@foroyaprent.fo
314555

Upplag: 800

# INNIHALD

Oddagrein....................................................3
Av skipsbrúgv til skúlaskap..............................4
Ætlanir um útbygging bíða..............................8
Manningarfeløg hildin uttanfyri......................10
Vinnuháskúlin skal upp á 300 næmingar .......12
Prógvhandan ................................................14
Nonnufrensur gjørdist fakfelagsmaður ..........16
Gott avkast av eftirlønini...............................23
Føroysku sáttmálarnir komnir til høldar.........24
Skráin til aðalfundin .......................................25
Tíðindi ...........................................................26
Føðingardagar...............................................27
Hanna Hvannastein nýggj á skrivstovuni........27

# Tilfeingilsgjøldini – bastardurin í sáttmálanum



Nú eru teir so aftur í gongd, politikaranir, at fáa líkningina við tilfeingisgjaldinum at ganga upp.

Líka síðani tilfeingisgjøldini av fyrstan tíð blivu sjósett í 2011, hava hesi verið ein kastibløka í politisku skipanini.

Við einum gerðarrættardómi í 2013 fingu vit hesi ólukku gjøld smoygd niður yvir høvdið á okkum. Dómurin segði nevniliga, at øll alment ásett veiðugjøld vóru loyvdir frádráttir eftir sáttmálanum.

Hesin sami dómur er brúktur sum argument, bæði tá tað snýr seg um tilfeingisgjald og um gjald fyri fiskirættindi keypt á uppboðssølu.

Men øll árini hava hesi gjøld verið til miklan ampa, serliga tí tað hevur verið at kalla vónleyst at fáa nakað, sum líkist stabiliteti, rundan um hesi gjøldini.

Tí enda tey eisini hvørja ferð sum tann stóri snúningsásin í sáttmálasamráðingunum.

Og nú eru politikararnir Guð hjálpi mær aftur farnir í hernað. Hesa ferð hava teir sameint seg við annan av sáttmálapørtunum, nevniliga reiðararnar. Men hin sáttmálaparturin, sum er manningarfeløgini, er ikki so frægt sum boðin á ein einasta fund um hetta.

Sera løgið, má sigast, at annar parturin verður boðin við at tingast um síni egnu gjøld, sum hann harvið sjálvur er við til at áseta, meðan hin parturin bara skal halda hol og gjalda tað, honum verður álagt.

Møguliga verða vit bodnir til hoyring seinni, hvør veit, men tá munnu kúlurnar vera liðugt stoyptar, so okkara íkast í tað málið verður helst meira eitt eiti enn nakað annað.

Men lat tað verða sligið fast, og tað við sjey tumma seymi, at hjá mær er eingin ivi um, at nú er lagaliga løtan komin, at manningarnar verða lóggivnar burtur úr líkningini, soleiðis at tær fram eftir sleppa undan hesum bastardinum og politisku kastibløkuni, ið veiðigjaldið er, og sum ferð eftir ferð gerst eitt høvuðsstríðsmál í sáttmálasamráðingunum.

Reiðararnir hava eftir øllum at døma tikið gjaldið til sín og eru aktivt farnir at smíða karmarnar um tað. Lat teir so eisini einsamallar eiga tað.



***Ólavur Gunnarsson***
*formaður í Maskinmeistarafelagnum*



# Av skipsbrúgv til skúlaskap

**Eftir drúgva tíð á sjónum vildi Símun Poulsen royna seg á landi og bleiv lærari. Í fjør summar kundi hann seta seg í stjórasessin á Vinnuháskúlanum**

**Tekstur og myndir**:
Ingolf S. Olsen – PRESS

1. juli í fjør tók 51 ára gamli Símun Poulsen við sum nýggjur stjóri á Vinnuháskúlanum, har hann síðani 2013 hevði verið undirvísingarleiðari og í tíðarskeið eisini virkandi stjóri.

At hann endaði sum skúlastjóri, eftir at hann hevði valt sjólívið frá og í 2002 fór á lærarskúla, kom helst ikki óvart á tey, sum kenna hann. Hann hevur nevniliga ongantíð dult, at skúlaleiðsla hevði hansara stóra áhuga.

- Nú eri eg giftur við einum lærara, so tað hevur kanska havt sína ávirkan á, at eg fór júst tann vegin, men leiðsluparturin hevur helst alla tíðina ligið í bakhøvdinum, sigur hann.

Símun er ættaður av Strondum, og sum so nógvir ungir menn, ið eru uppvaksnir í fiskivinnubygdum – pápin var eisini skipari – fór hann til skips sum blaðungur. Hann var 16 ár, tá hann fór sín fyrsta túr, og trý ár seinni fór hann á skiparaskúla.

Síðani sigldi hann í tvey ár sum stýrimaður við ymiskum trolarum og eitt hálvt ár við farmaskipi, áðrenn hann fór aftur upp á skúla fyri at lesa til skipsførara.

Tað prógvið tók hann í 1993, var so stýrimaður við partrolaranum Topas í nakrar mánaðir, áðrenn hann á sumri 1994 mynstraði við einum stórum ro-ro-skipi hjá DFDS.



*- Eg fari eftir førimuni at gera mítt besta, og tað liggur til mítt lyndi at royna at leiða í eygnahædd og at vera sjónligur á øllum skúlanum, sigur Símun Poulsen, stjóri á Vinnuháskúlanum*

## Vildi í land

Hann sigldi í átta ár sum stýrimaður – ávikavist annarstýrimaður, fyrstistýrimaður og yvirstýrimaður – við trimum av hesum ro-ro-skipunum hjá DFDS. Men í 2002 tók hann stóru avgerðina um at fara í land.

- Eg føldi upp á onkran máta, at eg bleiv eitt sindur fjarur frá tí føroyska samfelagnum. Eg var í tveimum mentanum allatíðina. Ikki tí, tað vóru óalmindiliga góðar umstøður at sigla hjá DFDS, ið er eitt gamalt, søguríkt reiðarí, sum er ógvuliga væl skipað.

- Tey árini, børnini vóru smá, hevði eg satt at siga eisini roynt at fingið okkurt starv á landi. Men tað er eitt minus við skipsføraraútbúgvingini



*Símun Poulsen leggur dent á at vera sjónligur allastaðni á geografiskt spjadda Vinnuháskúlanum. Her er hann í maskinrúminum undir Krákugjógv*

samanborið við til dømis maskinmeistaraútbúgvingina, at hon er rættiliga tunn, um tú vilt upp á land at arbeiða. Serliga um tú ætlar tær okkurt leiðaraella millumleiðarastarv við góðari løn. Eg var í hvussu er ov stuttur til tað, eg søkti, so tað bleiv av ongum tá, greiðir Símun frá.

Árini á Læraraskúlanum sigldi hann rættiliga nógv sum avloysarastýrimaður hjá Strandferðsluni, og hann hevur heldur ongantíð slept sambandinum við sjógvin. Hann fer onkran túr av og á og hevur tískil fult vinnubræv.

## Á Vinnuháskúlan

Eftir lokna lærarútbúgving í 2006 var hann í eitt ár lærari í Vestmanna, men so søkti Brandskúlin við Áir, sum er partur av Vinnuháskúlanum, eftir lærara.

Símun søkti og fekk starvið, og síðani hevur hann verið partur av lærarahópinum á Vinnuháskúlanum. Í 2008 kom hann til Havnar at undirvísa í Nóatúni.

Næstu árini tók hann við síðuna av lærarastarvinum ein master í skúlaorganisasjón og skúlaleiðslu á Danmarks Pædagogiske Universitet í Danmark.

- Hans Johannes á Brúgv var skúlastjóri tá, og hann eggjaði mær til. Táverandi varaskúlastjóri nærkaðist pensjónsaldri. Vit báðir Vilhjálmur Gregoriusen, ið bleiv stjóri í 2012, høvdu eisini tosað saman um leiðslupartin. Tíverri hendi ein sorgarleikur á sumri í 2013, tá Vilhjálmur brádliga doyði. Tá hendi alt um eina leið, at vit fingu nýggjan stjóra, Wilhelm Petersen, og hann eggjaði mær til at søkja leiðslupartin, og eg bleiv undirvísingarleiðari sama heystið, greiðir Símun frá.

## Sjónligur leiðari

Nú hevur hann so tikið seinasta stigið upp eftir og er blivin skúlastjóri.

– Eg fari eftir førimuni at gera mítt besta, og tað liggur til mítt lyndi at royna at leiða í eygnahædd og at vera sjónligur á øllum skúlanum. Eg havi eisini undirvíst nakað, síðani eg bleiv stjóri, men skúlin er geografiskt býttur í trý – í Nóatúni, undir Krákugjógv og Brandskúlin við Áir – og fyri betri at kunna vera sjónligur allastaðni, havi eg umhugsað ikki at undirvísa næsta hálvár, sigur Símun Poulsen.

Tá hann ikki fæst við skúlaskap, dámar honum væl at flóta í bátinum. Eisini er hann aktivur í nevndini hjá H71 og hjápir til í sambandi við dystir. Hondbólturin hevur altíð fylt nógv. Í síni tíð spældi hann sjálvur eina tíð á besta liðnum hjá STÍF á Strondum. Synirnir Vilhelm og Helgi eru báðir uppvaksnir í H71. Vilhelm er kendur frá føroyska A-landsliðnum í hondbólti og spælir við íslendska felagnum Fram í Reykjavík.

Umframt teir báðar eigur Símun dóttrina Annu, sum lesur búskaparfrøði á Universitetinum í Keypmannahavn og sonin Jóhannus, í býr í Kolbeinargjógv, og hann hevur siglt nógv, serliga við línubátum. Konan Frida ger í løtuni eina Ph.d. granskingarverkætlan á Fróðskaparsetrinum og DPU (Danmarks Pædagogiske Universitet).

Effo flytur orku
á sjógvi og á landi

effo.fo

effo

EYKALUTIR

www.mest.fo
MEST
SHIPYARD

24/7 TÆNASTA – RING +298 79 11 00


Lætt at bíleggja umvegis telefon ella teldupost


24/7 tænasta


Størsta og besta goymsla í landinum



Sølubúð/goymsla í Havn, Runavík og á Skála


Vit koyra kring alt landið


Álítandi tænasta

MEST P/F · J.C. Svabosgøta 31 · P.O. BOX 65 · FO-110 Tórshavn · tel: +298 301100 · sales@mest.fo

# Ætlanir um útbygging bíða

**Skúlin undir Krákugjógv er stak góður, heldur nýggi stjórin á Vinnuháskúlanum. Tað hevði eisini elvt til aðrar trupulleikar at savna alt virksemið í Nóatúni, nú ætlanin er at økja næmingatalið, sigur hann**



*Símun Poulsen letur væl at skúlanum undir Krákugjógv: - Har er gott pláss, og hann er væl útgjørdur*

**Tekstur og mynd**:
Ingolf S. Olsen – PRESS

Fyri trimum árum síðani bar Maskinmeistarin søguna um stórfingnar útbyggingarætlanir á Vinnuháskúlanum. 1.200 fermetrar skuldu byggjast afturat skúlabygninginum í Nóatúni í Havn, og síðani skuldi alt virksemið í verandi maskinskúla undir Krákugjógv flytast oman haðar.

– Tað prátið er steðgað eitt sindur upp, og tað hevði eisini elvt til aðrar trupulleikar at savna alt virksemið í Nóatúni, samstundis sum málið nú er at økja næmingatalið úr verandi 210 upp í 300. Tí tað er soleiðis, at næmingarnir á Vinnuháskúlanum fyri tað mesta koyra í egnum í bili, og møguleikarnir at bøta um tepru parkeringsumstøðurnar í Nóatúni eru rættiliga avmarkaðir. Í skúlunum undir Krákugjógv og í Nóatúni hvør sær er gott pláss, so tað er ongin trupulleiki er í so máta at økja næmingatalið, sigur hann.

## Góður skúli

Símun Poulsen leggur dent á, at skúlin undir Krákugjógv er ógvuliga góður.

– Har er gott pláss, og hann er væl útgjørdur. Námsfrøðin er ógvuliga týdningarmikil, tað at tú sum lærari fært visualiserað til dømis torgreidda tøkni á skíggja, talvu ella fysiskt í starvsstovum. Undir Krákugjógv hava vit væl útgjørdar og góðar starvsstovurn til eitt nú el, stýringar, motorlæru, køling, hydraulikk og so framvegis. Alt er har, og har er eitt fínt verkstað.

- So at siga tað, at alt hevði blivið betri, um tú savnaði alt í Nóatúni, tað er ikki neyðturviliga rætt. Eg síggi soleiðis upp á tað, at best er at hugsavna seg um at brúka tað optimalt, sum vit hava nú, og fáa tað ordiliga gott – og tað er longu ordiliga gott, sigur hann.








ROYN TÍNA VITAN Í VERULEIKA-KENDUM UMSTØÐUM

# TAK SKEIÐINI TÁ TÚ ERT HEIMA

SENDISTOVAN

## Vit hava nýggjastu tøknina og bestu umstøðurnar at læra nýtt.

Siglir tú úti ella heima er tað ómakaleyst at taka skeiðið hjá okkum. Vinnuháskúlin hevur í 130 ár útbúgvið tey bestu av teimum bestu.

### VIT BJÓÐA ØLL SKEIÐ

- BRM-skeið
- ECDIS-skeið
- GOC-skeið
- DP-skeið
- Eldsløkkingar-skeið
- SSO-skeið
- ERM-skeið
- Tecdis-skeið
- Heilsu-skeið
- ARPA-skeið
- Trygdar-skeið
- Stroppa-skeið

... og nógv onnur skeið

Finn skeiðsyvirlit og tilmelding á
**www.skeid.vh.fo**

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

# Manningarfeløg hildin uttanfyri

**Ólavur Gunnarsson heldur tað vera løgið, at manningarfeløgini als ikki eru umboðað í Vakstrarformum, sum løgmaður júst hevur stovnað. Serliga tí havið bleiv framhevjað sum vakstrarøki á fyrsta fundinum**

**Tekstur og myndir**:
Ingolf S. Olsen – PRESS

– Starvsfelagið umboðar so ikki okkum. Hvørki so ella so.

So avgjørdur er Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, um Vakstrarforum, sum løgmaður í tíðindaskrivi í februar boðaði frá, at hann hevði sett á stovn.

Tíðindaskrivið var skrivað eftir fyrsta fundin í Vakstrarforum, og har vóru tey blivin samd um beinanvegin at hugsavna seg um at arbeiða við havinum sum vakstrarøki. Løgmaður greiðir í tíðindaskrivinum frá, at Vakstrarforum er sett á stovn at "birta upp undir virðisøking í siðbundnu vinnunum og alternativum framtíðarvinnum í Føroyum".



*- Fakfeløgini og tess limir verða eftir øllum at døma bara sædd sum eitt haft um beinið, tá samgongan tosar um vinnu og arbeiðsmarknað, og ikki ein ressursa, sigur Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum*

## Ongin umboðan

Alt samalt mikið gott, heldur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum – var tað ikki bara tað, at onki av manningarfeløgunum er boðið at vera við í Vakstrarforum. Í staðin boðar løgmaður frá í tíðindaskrivinum, at formaðurin í Starvsfelagnum umboðar arbeiðstakararnar.

– Eg fái ikki ilt av, at Starvsfelagið er partur av Vakstrarforum. Men tað felagið umboðar alment sett fólk á landi og í hvussu er ikki Maskinmeistarafelagið. Eg haldi, at tað er ørkymlandi, at onki av manningarfeløgunum er so frægt sum tikið við upp á ráð ella umboðað í Vakstrarforum, tá nú havið er tað einasta vakstrarøkið, sum beinleiðis er nevnt í útmeldingini hjá løgmanni, sigur Ólavur Gunnarsson.

## Helst tilvitað

Hann er eisini ørkymlaður, tí hann óttast, at tað er tilvitað, at manningarfeløgini eru lopin um.

- Gaman í hava vit eina borgarliga samgongu. Men tað er fantastiskt, hvussu væl tað altíð ber til at snúgva sær rundan um fakfeløgini, tá okkurt er á politisku dagsskránni, sum hevur við vinnu og arbeiðsmarknað at gera.




*Vakstrarforum hevði sín fyrsta fund 12. februar, og tá vóru tey samd um at viðgera nærri, hvussu størri virði kunnu fáast úr havinum á burðardyggan hátt. Limirnir í Vakstrarforum eru úr vinstru: Guðrið Højgaard, stjóri í Visit Faroe Islands, Rúni M. Hansen, nevndarformaður í Tjaldur og Bakkafrosti, Súni Selfoss, formaður í Starvsfelagnum, Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í vinnumálum, Rúnar Reistrup, stjóri í YunoJuno, Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, Bartal Dulavík, sølu og marknaðarstjóri í Hordafor, Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, og Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum. Eyðun Christiansen, stjóri í Kommunufelagnum, vantar á myndini (Mynd: Løgmansskrivstovan)*

– Fakfeløgini og tess limir verða eftir øllum at døma bara sædd sum eitt haft um beinið, tá samgongan tosar um vinnu og arbeiðsmarknað, og ikki ein ressursa, sigur Ólavur Gunnarsson,

## Klossut

Hann heldur, at góða ætlanin, sum helst liggur aftan fyri átakið, kann fara fyri skeyti í føðingini, tá tað verður byrjað so klossut.

- Ætlanin er helst, at fólk við servitan av ymiskum slag skulu koma við genialum hugskotum. Alt gott um tað, men saman við øllum møguligum øðrum nevnir løgmaður í síni útmelding sjálvur arbeiðsmarknaðin sum ein part av samansetingini av Vakstrarforum. Eg eri ikki fornermaður, men kann bara staðfesta, at arbeiðsmarknaðurin á havinum í hvussu er ikki er við har, sigur Ólavur Gunnarsson.

- Nú hava vit í longri tíð hoyrt hesa samgonguna júka um at avtaka nevndir og ráð, so tað er eitt sindur av eini andsøgn, at hon nú setir eina nýggja nevnd. Men tá løgmaður kortini ger tað, so haldi eg, at tað er umráðandi, at eitt forum sum hetta, ið er ætlað at arbeiða við vøkstri á havinum, hevur nóg breiða umboðan, sigur hann.

## Nógv eru við

Sambært tíðindaskrivinum hjá løgmanni er Vakstrarforum samansett við servitan úr ymiskum vinnugreinum, arbeiðsmarknaði, gransking, íverksetan, orku, burðardygd og øðrum, og tey, ið manna Vakstrarforum eru Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum, Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum, Rúni M. Hansen, nevndarformaður í Tjaldur og Bakkafrost, Marita Rasmussen, stjóri í Vinnnuhúsinum, Guðrið Højgaard, stjóri í Visit Faroe Islands, Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum, Bartal Dulavík, sølu- og marknaðarstjóri í Hordafor, Rúnar Reistrup, stjóri í YunoJuno, Eyðun Christiansen, stjóri í Kommunufelagnum, og Súni Selfoss, formaður í Starvsfelagnum og umboð fyri arbeiðstakarar.

Vit royndu at fáa fatur á løgmanni fyri at fáa eina viðmerking, men tað eydnaðist ikki.

# Næmingatalið á Vinnuháskúlanum skal økjast

**Nýggi stjórin á Vinnuháskúlanum vil framgongd og onkrar broytingar, men tað skal ikki vera nøkur kollvelting.**

**Tekstur og mynd**: Ingolf S. Olsen

Í dag ganga 210 næmingar á Vinnuháskúlanum, men tað talið skal koma upp ímóti 300 næmingar um nøkur ár. Tað er greiða málið hjá Símuni Poulsen, sum tók við sum stjóri á Vinnuháskúlanum 1. juli í fjør. Tá hevði hann frammanundan verið virkandi stjóri í nakrar mánaðir.

Tó at tørvur er á støðugt færri hondum í fiskivinnuni, so hvørt sum skipini gerast meira tøkniliga framkomin, so er tørvurin á fólki við maritimum útbúgvingum alsamt vaksandi í heimshøpi, staðfestir hann.

– Í shippingvinnuni, er tørvurin vaksandi. Meðan talið av føroyskum fiskimonnum er minkað heilt nógv seinastu nógvu árini, er talið á føroyingum umborð á farmaskipum vaksið við fleiri hundrað hetta tíðarskeiðið. Nógvir sigla úti við fremmandum skipum, men eisini føroyska shippingvinnan veksur. Tað er onki at ivast í, at maritima vinnan manglar fólk, sigur Símun Poulsen.

### Á føroyskan kjøl

Meðan føroyska shippingvinnan søguliga hevur verið nógv grundað á sigling upp á Føroyar, er ein broyting við at henda har, vísir stjórin á Vinnuháskúlanum á.

– Vit hava føroysk reiðarí sum bara hava virksemi uttanlands, og hvørs skip ongantíð koma í føroyska havn. Tað er gott, og møguleiki skuldi verið fyri, at shippingvinnan veksur enn meira tann vegin. Vit hava eisini hópin av navigatørum og maskinfólki, sum sigla við útlendskum, serliga donskum, reiðaríium, men tað hevði sjálvandi verið uppaftur betur, um tað var á føroyskum kjøli, sigur hann.

### Gravgangur

Tørvurin á yvirmonnum á sjónum er vaksandi, bæði tá tað snýr seg um navigatørar og maskinfólk. Men á landi er tað serliga gravgangurin eftir maskinmeistarum, sum er vaksandi.

- Maskinmeistaraútbúgvingin er ein genial útbúgving, og við tí tøkniligu menningini, sum fer fram allastaðni, nýggjum vinnugreinum og virkisøkjum, til dømis innan fyri grøna orku, so vænti eg, at vaksandi eftirspurningurin fer at halda fram, sigur stjórin á Vinnuháskúlanum.

Tað eru tey, sum halda, at munurin ímillum eftirspurdu førleikarnar á sjónum og teir á landi er blivin so stórur, at maskinmeistaraútbúgvingin átti at verið tvey-streingjað, soleiðis at næmingarnir tíðliga kundu valt, um teir fóru sjóvegin ella ætlaðu sær eina lívsleið á landi. Tí eftirspurdu førleikarnir, serliga innan el, eru so ymiskir.

### Útbúgving rakar væl

Men Símun Poulsen er tó ivasamur um tað.

– Gaman í hava tey enn tað gomlu tvey ára maskinmeistaraútbúgvingina í Noregi, har el bara er ein lítil partur. Tí sigla tey flestu norsku skipini við bæði meistara og elektrikara. Í tí donsku maskinmeistaraútbúgvingini, sum er meinlík okkara, er so nógv ellæra, at teirra og okkara skip í flestu førum sigla uttan elektrikara.

– Men eg haldi, at júst Danmark og Føroyar, eru góð dømi um, at útbúgvingin rakar væl, sama um tú ætlar tær sjóvegin ella eitt arbeiði á landi. Tí tekur tú Danmark, so er tað kanska bara umleið ein tíggjundapartur av maskinmeistarunum har, sum fær sær eina maritima lívsleið. Restin arbeiðir á landi. Í Føroyum er tað øvugt ella nær við tað. Men útbúgvingin í báðum londunum er hin sama. Tað merkir eisini, at føroyskir maskinmeistarar enn eru rættiliga maritimir, men at tað so eisini verða alsamt fleiri størv á landi, tað er bara at gleðast um., sigur hann.

### Bachelorar

Ein annar spurningur, sum við jøvnum millumbilum hevur verið frammi í Føroyum, er, um maskinmeistaraútbúgvingin og skipsføraraútbúgvingin eiga at gerast til bachelor-útbúgvingar.

Meiningarnar hava verið ymiskar. Onkur hevur viljað havt útbúgvingarnar til bachelor-útbúgvingar burtur av, meðan onnur hava viljað, at tað skuldi vera valfrítt, og aftur onnur hava ynskt



*- Maskinmeistaraútbúgvingin er ein genial útbúgving, og við tí tøkniligu menningini, sum fer fram allastaðni, nýggjum vinnugreinum og virkisøkjum, til dømis innan fyri grøna orku, so vænti eg, at vaksandi eftirspurningurin fer at halda fram, sigur stjórin á Vinnuháskúlanum.*

at gjørt verandi útbúgvingar til sonevndar yrkisbachelorútbúgvingar.

Á Vinnuháskúlanum hava tey ongar ætlanir um, at gera maritimu útbúgvingarnar til bachelor-útbúgvingarnar burtur av, men Símun Poulsen sigur, at eitt av hansara málum er at betra møguleikarnar at kunna byggja ein akademiskan bachelor upp á verandi útbúgvingar.

## Góð loysn

Tann møguleikin er longu til staðar, tá tað snýr seg um maskinmeistararnar. Orkuverkfrøði hevur verið ein møguleiki, men áhugin hjá maskinmeistarum at lesa tað, var lítil. Men nú kunnu teir taka 135 ECTS-stig við sær út á Fróðskaparsetrið og blíva akademiskir bachelorar í maskinfrøði. Maskinfrøðiútbúgvingin tekur stívliga eitt ár afturat maskinmeistaraðútbúgvingini.

– Tað er ein sera góð loysn, og vit arbeiða spakuliga við eisini at geva møguleika fyri at uppstiga skipsføraran til bachelor. Trupulleikin er kanska, at tað er lættari at gera eina beina linju frá maskimeistaranum til hægri útbúgvingar sum maskinfrøði ella okkurt slag av verkfrøði. Fakini eru nøkulunda tey somu bara á vaksandi stigi.

– Við navigatørútbúgvingini er hatta ein avbjóðing. Har mugu vit so brúka orku upp á at finna okkurt, sum vit kunnu spesialisera skipsføraraútbúgvingina upp ímóti. Ein møguleiki kundi til dømis verið shipping, sigur Símun Poulsen.

## Fleiri ætlanir

Við einari bachelorútbúgving er lagamanni at fara undir kandidatlesnað á lærdum háskúlum uttanlands. Eitt nú ber til at fara undir verkfrøðilesnað á Danmarks Tekniske Universitet, DTU, við einum føroyskum bachelorprógvi í maskinfrøði í hondini.

Símun Poulsen sigur, at hann sum nýggjur stjóri sjálvandi hevur ymiskar ætlanir um broytingar og betringar á Vinnuháskúlanum, men hann er varin við at seta nøvn á átøk, sum hann ikki hevur tosað við avvarðandi partar um.

– Nú hevur tað eisini verið so, at alt hevur ligið meira og minni bakk av koronu, síðani eg tók við, so hetta er ikki akkurát tíðin at fara undir tær stóru ætlanirnar, sigur hann.



*Korona krevur sínar avmarkningar allastaðni. Vanliga er Skálin á Vinnuháskúlanum stúgvandi fullur, tá prógvhandan er, men nú gjørdu krøvini um frástøðu tað meira rúmsátt*

# Seks maskinmeistarar fingu prógv

**Nýklaktu maskinmeistararnir fingu eggjandi orð frá røðarunum. Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum legði millum annað dent á sera fjølbroyttu starvsmøguleikarnar, tí maskinmeistarar eru nógv eftirspurdir bæði á sjógvi og landi**

**Tekstur**: Ingolf S. Olsen – PRESS
**Myndir**: Maria Lava Jacobsen

22. januar var pógvhandan á Vinnuháskúlanum, og millum teirra, sum fingu prógv, vóru seks maskinmeistarar.

Nógvar góðar og eggjandi røður blivu hildnar, og sum tað er siðvenja, var formaðurin í Maskinmeistarafelagnum eisini ímillum røðararnar.

### Teir bjargaðu Heklu

Ólavur Gunnarsson hugleiddi um fjøltáttaðu starvsmøguleikarnar hjá maskinmeistarum, og fyri at lýsa, hvussu avgerandi teirra leiklutur er, tó at onnur ofta taka heiðurin fyri avrikini, segði hann søguna um damparan Heklu, sum fyri umleið 120 árum síðani við nógvum ferðafólki umborð breyt skrúvuaksilin í ódnarveðri úti í Norðuratlantshavinum.

Við kílum og øðrum, sum fyri var, eydnaðist tað at fáa pjøssað brotið saman aftur, so skipið aftur fekk framtøkumegi. Neyðumvælingin helt í seks dagar í harðari sigling í ringasta veðri. Tá stakk brotið upp aftur, men enn einaferð legði maskinmanningin til brots, og tað eydnaðist enn eina ferð, millum annað við veirum, at væla so frægt um aksilin, at skipið vann upp havn í New York.

Tá vóru maskinmenninir fyrilagstir, og onkur hevði eisini fingið stálsplintur í eyguni. Men komin til New York gav ongin teimum gætur. Ístaðin var



*Undirhaldið var á høgum stigi, sjálvur Hanus G. Johansen var gestasangari*

*Hesir fingu prógv sum maskinmeistarar: Marcus Alexander Benzon Klementsen, Pól Jóhannus Justinussen, Benjamin Sólarnsson Isaksen, Gilli Niclasen Lorenzen, Johan Holm Erlingsson og Rói Debes Winthereig.*

*Virðislønir: 1. Johan Holm Erlingsson, grindaknív frá SEV. 2. Gilli Niclasen Lorenzen, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum. Ídnisvirðisløn: Benjamin Sólarnsson Isaksen, lummaur frá Skansi Offshore*



skipsførarin heiðraður fyri sín fantastiska sjómansskap við bæði samkomu og telegraferaðari heilsan.

## Nógvir møguleikar

Hóast hesa søguna kundi Ólavur Gunnarsson við eggjandi orðum vissa nýklaktu maskinmeistararnar um, at teir vóru komnir til búgvið borð, tá tað um starvsmøguleikar ræður.

”Tit hava fingið tykkum eina frálíka útbúgving, sum peikar beint frammeftir. Makskinmeistaraútbúgvingin er allarhelst tann breiðasta og mest fjøldtáttaða útbúgvingin, ein kann nema sær, so her er ongin orsøk at halda seg aftur.

Framman fyri tykkum bíðar ein spennandi starvsleið við alskyns møguleikum. Tær kompetansur tit hava nomið tykkum, eru nevniliga eftirspurdar, bæði á sjógvi og landi.

Á sjónum er talan um siðbundnu størvini innan fiski- og farmavinnuna, men seinnu nógvu árini hevur frálandavinnan eisini meldað seg á banan sum ein stórur avtakari. Hendan vinnan tykist kanska at verða í einum aldudali í løtuni, man man ikki tað fara at vera, at har kemur gongd á aftur (...)

Á landi skortar heldur ikki uppá starvsmøguleikarnir, vit síggja eina øking av maskinmeistarastørvum, bæði innan tann privata og tann almenna geiran. Í tí privata er tað serliga innan alivinnuna og økir, sum hava við hana at gera, og í tí almenna er talan um útbyggingar innan orku og heilsuverkið. Eisini í byggivinnuni eru maskinmeistarar blivnir áhugaverdir, bæði í byggifasum, og aftaná við at servisera allan tann tekniska útbúnaðin, sum hesar byggiverkætlatnir eru fyltar við.



*Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum røddi um góðu starvsmøguleikarnar hjá maskinmeistarunum*



*Símun Poulsen, stjóri á Vinnuháskúlanum, bjóðaði vælkomin. Í síni røðu nam hann millum annað við møguleikarnar í shippingvinnuni og við adressu til serliga maskinmeistararnar vísti hann kollveltandi broytingarnar í sambandi við grøna orkuskiftið*

Ein av styrkjunum hjá maskinmeistarum, er møguleikin at velja starvsleið eftir teimum umstøðum, sum ein er í. Her er ríkiligt av møguleikum at skifta ímillum størv á sjógvi og landi”, segði Ólavur Gunnarsson millum annað.



*Páll J. Hansen, maskinmeistari, gjørdist fremsti oddviti hjá føroyskum maskinmeistarum*

*Mynd: Ingibjørg Jacobsen*

# Nonnufrensur gjørdist garvaður fakfelagsmaður

**Hann gekk í skúla hjá nonnunum, men tímdi illa. Sum 14 ára gamal fór hann at arbeiða á verkstaði hjá Tórshavnar kommunu, og tað lá altíð í kortunum at gerast maskinmeistari. Og tað gjørdist hann. Hann kom eisini at standa sum oddviti hjá føroyskum maskinmeistarum í fleiri ár. Páll J. Hansen varð fakfelagsmaður burturav.**

**Tekstur:** Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

Hóast hann var nakað til skips, bæði sum dekkari og maskinmeistari, so vildi lagnan tað soleiðis, at lívsstørv hansara komu at vera á landi: Hjá SEV, og sum fakfelagsmaður, fyrst sum álitisfólk, síðani sum nevndarlimur í Maskinmeistarafelagnum, og at enda sum formaður í Maskinmeistarafelagnum í fleiri ár. Og hjartað hansara bankar framvegis fyri SEV og fakfelagsarbeiðnum hjá maskinmeistarum.

Tá vit hitta hann hendan dagin, hevur hann longu gingið fasta túrin av Heygnum Mikla fram við gamla heimi sínum í Hornabø, og haðani út á Bursatanga. Har hittir hann vinmannin, Vilhelm Seier Hansen, sum hann flestu dagarnar á árinum loysir heimstrupulleikarnar saman við í umleið ein tíma - har undir Steffansons-húsum, og so fer hann heimaftur. Teir báðir rópa hvønn annan "tvíburðabróðurin". Ikki tí teir eru brøður, men teir eru javngamlir, og eru sum teir einastu havnarmenninir yvirhøvur báðir bornir í heim hin 20. november 1947.

Hendan dagin hevur Páll J. Hansen tveir høvuðs boðskapir:

"Fyrrverandi arbeiðspláss mítt, SEV, skal fáa frið at arbeiða, og politikarar skulu halda fingrarnar langt burtur frá hesum frálíka felagsskapinum."

Hin boðskapurin er:

"Maskinmeistarafelagið skal halda fram at arbeiða fyri limirnar, soleiðis at umstøðurnar altíð eru tær bestu hjá føroyskum maskinmeistarum á sáttmálaøkinum."

## Skúlatroyttur nonnufrensur

Páll J. Hansen gekk í skúla hjá nonnunum í Havn, men hann og skúlin vóru ongantíð serliga væl. Tað var eisini orsøkin til, at hann gavst í skúlanum beint áðrenn 13 árs-royndina í 7. flokki. Í staðin fór hann at arbeiða á verkstaðnum ella smiðjuni hjá Tórshavnar kommunu, sum hann plagdi at ganga framvið, bæði, tá hann fór í skúla, og tá ið hann fór heim eftir skúlatíð.

– Í hesum verkstaðnum arbeiddu vit upp á øll møgulig amboð hjá kommununi, eisini bilar, gravmaskinur, kompressarar og so framvegis. Teir, sum arbeiddu í smiðjuni tá, eru báðir farnir, Birgir Hansen og Bjarni Carlsson. Har dámdi mær avbera væl at arbeiða, sigur Páll J. Hansen.

Hann var 14 ára gamal, tá hann byrjaði at arbeiða í smiðjuni hjá Tórshavnar kommunu. Skuldi tú í læru tá, skuldi tú vera fyltur 15 ár. Og júst fyltur 15 ár fór Páll í læru sum elektrikari hjá Einar Mikkelsen í Havn. Arbeiðið upp á H-bygningin á Landssjúkrahúsinum var júst byrjað, og har slapp Páll at arbeiða alla lærutíðina, sum vardi fýra ár.

– Tað var ógvuliga spennandi, tí eg slapp at fylgja øllum arbeiðnum næstan frá byrjan til enda. Fyrsta hæddin var júst liðug, so eg var við í arbeiðnum,



*Páll J. Hansen millum tveir neyðgeneratorar á støð 1 á Sundsverkinum hjá SEV*

*Mynd: Ingibjørg Jacobsen*




**NAVN:** Páll J. Hansen

**BORIN Í HEIM:** 20. november 1947

**ÆTTAÐUR:** Føddur og uppvaksin í Hornabø, Tórshavn

**BÚSTAÐUR:** Tórshavn

**ÚTBÚGVING:** Maskinmeistari

**YRKI:** Eftirlønarmóttakari seinastu 3 árini. Fór frá sum formaður í Maskinmeistarafelagnum í mars 2018

**LIMASKAPUR:** Maskinmeistarafelagið síðan 1972

***Páll J. Hansen stendur her millum fyrrverandi starvsfelagar á Sundsverkinum. Tá ein teirra spyr, um hann leingist inn á Sundsverkið, svarar hann: "Nei, tað haldi eg ikki, men mær leingist aftur í Maskinmeistarafelagið"***

***Mynd: Ingibjørg Jacobsen***

heilt til ovasta hæddin var liðug. Eg var fegin um at sleppa at arbeiða í H-bygninginum, tí eg visti, at eg hevði ikki trivist við at arbeitt sum elektrikaralærlingur heima í býnum til dømis, har vit skuldu leggja ravmagn inn í eini sethús fyri og onnur eftir. Á Landssjúkrahúsinum var eg við at leggja rør inn í betongið allan vegin upp, seta lampustøð upp og líknandi, so hetta við H-bygninginum var akkurát nakað fyri meg, sigur hann.

Hann arbeiddi heilt til fyrstu heilsustarvsfólkini og fyrstu sjúklingarnir komu inn í bygningin. Tað var beiggi Einar Mikkelsen, Eyðálvur Mikkelsen, sum stóð fyri el-arbeiðnum á Landssjúkrahúsinum.

## Til skips

Páll var liðugur at læra til elektrikara í 1967. Hann flennir eftir, at hann arbeiddi bara ein dag sum sveinur, so fór hann til skips. Hann slapp á sild við vakra skipinum, Skt. Jack. Eftir tað fór hann til Danmarkar, har hann fór á skúla at taka tað aftur, sum hann ikki tók hjá nonnunum. Tað var neyðugt, skuldi hann upp á maskinskúla. Men áðrenn hann fór í skúla, fór hann til Grønlands sum dekkari við stóra línubátinum, Leivi Hepna.

– Vit fóru avstað í november, og tá var trupult at fáa manning, so vit fóru inn í Íslandi á vegnum, og har komu tíggju mans umborð. Fiskiskapurin var avbera góður fyrstu tíðina í Grønlandi, men so steðgaði fullkomiliga upp frá einum degi til annan, og toskurin hvarv. Og hann var burtur í fleiri ár, minnist Páll J. Hansen.

Aftaná hendan túrin fór hann við Grasinum til Labrador og Nýfundlands. Hann var nakrar túrar við Grasinum, til hann gjørdi av at fara at arbeiða á Tórshavnar Skipasmiðju. Tað hevði altíð ligið í kortunum at gerast maskinmeistari, og nú skuldi tað vera. Men fyri at sleppa inn á skúlan var neyðugt við einum ári í einari smiðju, og tað var orsøkin til, at hann fór at arbeiða á skipasmiðjuni í Havn. Síðan fór hann í maskinskúla.

Hann tók útbúgving sum maskinmeistari í 1973, men longu í 1972 mynstraði hann fyrstu ferð sum maskinmeistari.

– Útbúgvingin var bygd upp øðrvísi tá, og tí kundi eg mynstra við Grasinum longu í 1972. Fyrst gekst tú eitt hálvt ár til maskinist, síðan tókst tú eitt hálvt ár aftrat at taka føroyska maskinmeistaraútbúgving, sum tað varð rópt, og tá kundi tú arbeiða við maskinum upp í 2.000 hestar. Síðani fórt tú á sjálva maskinmeistaraútbúgvingina, sigur Páll J. Hansen.

## Út at sigla

Um tað mundið, tá Páll var útbúgvin maskinmeistari, fóru flestu maskinmeistararnir við skipum hjá A.P.

Møller. Har vistu menn neyvt, hvør rutan hjá skipunum var, og nær teir sluppu heimaftur og so framvegis. Tað tímdi Páll ikki. Honum dámdi betur tað óvissa, tað var meira spennandi, helt hann. Og tí valdi hann at søkja hýru sum maskinmeistari við einum spildurnýggjum farmaskipi hjá reiðarínum "Skov Line", sum átti 26 farmaskip. Spildurnýggja skipið æt Dorit.

– Mær vantaði nakað av siglingstíð, so eg mynstraði sum juniormeistari. Og hendan fyrsta túrin fóru vit fyrst upp til Finnlands eftir pappíri, sum vit sigldu til Melbourne og Sidney í Avstralia. Túrurin tók 36 samdøgur, so tá var gott at hava verið á Flemmish Cap og fiskað frammanundan, flennir Páll.

Úr Avstralia sigldu teir við sukri til Japan, og haðani til Fiji-oyggjarnar eftir meira sukri. Tá teir komu upp aftur í Ermasund, krossaðu teir kósina, sum teir høvdu, tá teir fóru til Avstralia. Tá vóru teir komnir runt.



*Páll er her saman við Róaldi Johannesen, sum í dag hevur arbeiðið, sum Páll hevði, tá hann arbeiddi á Sundsverkinum*

*Mynd: Ingibjørg Jacobsen*

– Hóast skipið var spildurnýtt, so var tað smíðað sum eitt klassiskt skip. Vit høvdu B&W maskinu, og hóast hon ikki var meira enn 8.800 hestar, so vóru vit níggju mans í maskinrúminum. Skipið var alt annað enn nýmótans, hóast tað var nýtt, men tað var spennandi kortini, greiðir hann frá.

Starvsfelagarnir á Dorit fingu Páll at fara aftur á skúlabonk at taka endaliga og víðkað altjóða maskinmeistaraprógv. Men áðrenn hann fór aftur í skúla, fekk hann bjóðað arbeiði á Havnarverkinum hjá SEV við Oyggjarvegin í Havn. Hetta var meðan orkuverkið hjá SEV á Sundi varð gjørt.



*Fyrrverandi formaðurin í Maskinmeistarafelagnum heldur tað hava stóran týdning, at politikarar halda fingrarnar langt burtur frá SEV*

*Mynd: Ingibjørg Jacobsen*



*Eitt skifti var Páll við líniskipinum "Grasið"*

– Ætlanin var, at eg skuldi fara í skúla í august hetta sama árið, men eg varð hangandi har í tvey ár, áðrenn eg endiliga byrjaði á Danmarks Maskinmesterskole í Keypmannahavn, sigur Páll J. Hansen.

## SEV

Tá Páll hevði fingið endaliga prógvið sum maskinmeistari, fór hann aftur í starv hjá SEV, og nú var talan um arbeiði á Sundsverkinum, sum nú stóð liðugt. Her arbeiddi hann, til hann gavst í 2010. Tá var hann vorðin formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Tíðina, tey mongu árini hjá SEV, dámdi honum ógvuliga væl, tað var eitt gott arbeiðspláss.

– Í dag koyra fólk bara við fullari ferð fram við Sundsverkinum, men soleiðis var ikki, tá eg byrjaði at arbeiða har, tí tá var eingin vegur. Skuldi tú til arbeiðis, so noyddist tú annaðhvørt við báti, ella mátti tú ganga. Og eg havi mangan ótýdligan túrin gingið tað strekkið – í mjørka, kavaroki og illveðri. Men mær dámdi ógvuliga væl kortini. Eg arbeiddi millum annað sum vaktmeistari, og vit búðu á arbeiðsplássinum, áðrenn vegurin varð gjørdur, greiðir hann frá.

Fyrstu tíðina høvdu teir vakt eina viku í senn. Teir vóru seks mans til arbeiðis aftrat verkmeistaranum, og haraftrat var eisini ein kokkur. Osvald Hansen var verkmeistari, ta tíðina.

– So tað var sum at vera til skips, heldur hann fyri.

## Stórar broytingar

Nógvar og stórar broytingar eru farnar fram ta tíðina, Páll arbeiddi á Sundsverkinum frá 1974 til umleið 2010. Og hann heldur, at allar broytingar hava verið til tað betra. Til dømis arbeiddu teir 12 tímar vaktir, tá hann byrjaði á Sundsverkinum, áðrenn vegasamband var.

– Tað var broytt, tá vegurin kom, og samstundis vóru fleiri fólk sett í starv, so tá gjørdust umstøðurnar nógv betri. Tað var eisini stórur munur at arbeiða upp á teir gomlu motorarnar, sum vóru tá, og so við teir motorarnar, sum eru



*Páll var dekkari við Skt. Jack*

SJÓVINNUSTÝRIÐ



HVØRJUM KUNNU VIT HJÁLPA TÆR VIÐ?

SIGLINGARLOYVI
SKAÐAFRÁGREIÐINGAR
SKIPASÝN
FAS
SJÓVINNUBRØV
UNDANTAKSLOYVI
MANNINGARÁSETING
MYNSTRING
SIGLINGARBØKUR
SKIPASKRÁSETING
LOÐSPRÓGV
24/7 VAKTTELEFON

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

www.fma.fo / fma@fma.fo / tel 35 56 00

á verkinum í dag. Mirrlees-motorarnir vóru góðir, men teir vóru týpist enskir, robustir og tungir. Fyrst í 80-unum komu B&W-motorarnir aftrat, og stutt áðrenn eg gavst, fingu vit aftur nýggjar motorar. Og fyrimunirnir eru teir, at nýggjari motorarnir eru, betri eru teir at arbeiða við – tú sleppur betur til, teir eru bíligari í rakstri, og so halda teir longri, sigur Páll J. Hansen.

Hann er sannførdur um, at SEV hevur verið ein ógvuliga góður felagsskapur.

–SEV er framvegis ein góður felagsskapur, og eg haldi, at politikararnir skulu halda fingrarnar langt burtur. Hetta eru stak dugnalig fólk, og tey skulu hava frið at arbeiða. Alt ov nógv hava hug at blanda seg, so stutt sagt, latið SEV hava frið, sigur Páll J. Hansen.




*Páll var við Leivi Hepna, sum var eitt stórt línuskip tá í tíðini. Myndin varð tikin, beint áðrenn skipið var handað føroyingum. Tí er flaggið afturi á hekkuni norska flaggið*

**Fakfelagsmaðurin**

Í Føroyum – og ikki minst millum føroyskar maskinmeistarar og fakfelagsfólk, er Páll J. Hansen best kendur fyri sítt fakfelagsarbeiði, serliga seinastu árini sum formaður í Maskinmeistarafelagnum. Og áhugin fyri fakfelagsarbeiði byrjaði tíðliga.

– Tá eg byrjaði á Sundsverkinum, gingu vit 12 tímar vakt, og flestu okkara vóru tímaløntir fulla tíð. Sum heild var arbeiðið rættiliga óskipað tá, og tað kundi ikki halda fram. Fyrsti sáttmálin við SEV varð gjørdur í 1978, og tað var so ein byrjan, sigur Páll.

Um hetta mundið ella eini tvey ár seinni, varð Páll valdur til felags álitisfólk fyri allar deildirnar hjá SEV. Og sum álitisfólk kom hann næstu árini at sita við borðið í nógvum málum, eisini í sáttmálasamráðingum. Soleiðis varð hann spakuliga drigin inn í fakfelagsarbeiðið, eitt arbeiði og ein uppgáva, sum hann treivst væl við. Tá kom hann eisini at arbeiða nógv saman við teimum, sum tá sótu í Maskinmeistarafelagnum.

– Sum heild vóru nógvar umstøður broyttar til tað betra hesa tíðina í sambandi við arbeiðsviðurskiftini. Tá tú hevði vakt eina viku og frí eina viku, ja, so var arbeiðsvikan 82 tímar vika, nógv varð arbeitt um náttina, og tað bar jú ikki til. Í dag verður alt við arbeiðseftirliti og hvílitíð og líknandi yvirhildið, sigur Páll J. Hansen.

Í 1984-85 varð hann valdur í nevndina í Maskinmeistarafelagnum, og har varð hann sitandi til í mars 1992. Í 1999 kom hann innaftur í nevndina, og varð sitandi, líka til hann fór frá sum formaður í 2018. Tá hevði hann verið formaður síðan 2007.

– Tað var framvegis ynskið um at betra og menna sáttmálaviðurskiftini, sum gjørdi, at eg lat meg stilla upp til formann í felagnum. Eitt annað mál var at útvega okkum egin arbeiðshøli, so vit sluppu undan at gjalda leigu, og hetta fingu vit alt ígjøgnum, greiðir Páll J. Hansen frá.




*Tá Páll var liðugur við maskinmeistaraútbúgvingina í Føroyum, fór hann sum juniormeistari við spildurnýggja danska farmaskipinum, Dorit*

Hann vísir á, at fara vit eini 30 ár aftur í tíðina, so er himmalvíður munur á viðurskiftunum tá og nú, bæði tá tað kemur til handilsskip og fiskiskip. Til dømis var tað ikki so sjáldan, at reiðarí vóru afturút við avrokningum upp í fimm og seks túrar. Tað hendir ikki í dag.

– So kom teldan, og tá fólk dugdu at búka hana, fekst skil á mongum viðurskiftum, alt gjørdist einfaldari, betri og lættari, heldur hann.

Spurdur hvørja uppgávu hann heldur Maskinmeistarafelagið hava í dag, sigur fyrrverandi formaðurin í hesum sama felagnum:

– Tað er fyrst og fremst at halda tørn við verandi sáttmálum, og síðan at menna teir. Samstundis herðast krøvini til siglandi maskinmeistarar, og har mugu vit eisini fylgja við, sigur hann.

Hann tosaði fyri kortum við ein føroying, sum siglir sum maskinmeistari við einum spildurnýggjum norskum skipi. Og har er sjón fyri søgn, at krøvini herðast, og tøknin mennist við rúkandi ferð. Har umborð eru bara skermar, og tú hevur mestsum forboð fyri at brúka skiftilykil.

– Tað er gongdin, inn við teldum og skermum, og út við skiftilyklinum. Men enn sum áður er stóri fyrimunurin hjá einum føroyskum maskinmeistara, at hann eisini hevur eina handverkaraútbúgving, sigur Páll J. Hansen.

Kortini var hann sum formaður í felagnum heitur talsmaður fyri, at føroyskir maskinmeistarar hava møguleika at taka eina bachelor-útbúgving. Tað hava øll hini norðurlondini, og tí heldur hann, at vit eisini skulu hava tað í Føroyum.

– Og so kunnu vit ikki síggja burtur frá, at ein bachelor útbúgving vanliga gevur nakrar eyka krónur í sáttmálanum, og tað mugu vit ikki gloyma, sigur fyrrverandi formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll J. Hansen.

# Gott avkast av eftirlønini

**Allir heimsins virðisbrævamarknaðir hava merkt sviðan av koronu, men eftirlønarkundarnir hjá LÍV, teirra millum limirnir í Maskinmeistarafelagnum, kunnu kortini fegnast um eitt gott avkast, tí har hava tey dugað at fingið tað besta burtur úr støðuni**

Ingolf S. Olsen – PRESS

Samanborið við nógv onnur eftirlønarfeløg høvdu tey, sum hava sína eftirlønaruppsparing hjá tryggingarfelagnum LÍV, eitt gott avkast í fjør. Limirnir hjá Maskinmeistarafelagnum hava sína eftirlønaruppsparing hjá LÍV. Maskinmeistarafelagið eigur eisini sín part í LÍV umvegis p/f Fakfelag.



*– Tá partabrøvini fullu, gjørdu vit tað, at vit keyptu meira av partabrøvum, enn vit annars plaga, tí vit væntaðu, at tey fóru at javna seg og kanska hækka aftur rættiliga skjótt. Og tað er júst tað, sum er hent, sigur Arnfinnur Gudjónsson, íløgu- og stjórnardeildarleiðari í LÍV*

Koronufarsóttin herjaði annars við fullari megi alt árið í fjør, og tað merkti í stóran mun eisini allar heimsins fíggjar- og virðisbrævamarknaðir.

Partabrøvini fullu nógv, tá farsóttin tók seg upp, men júst hetta dugdi LÍV at venda til egnan fyrimun og harvið eisini til fyrimuns fyri tann einstaka eftirlønarkundan.

– Tá partabrøvini fullu, gjørdu vit tað, at vit keyptu meira av partabrøvum, enn vit annars plaga, tí vit væntaðu, at tey fóru at javna seg og kanska hækka aftur rættiliga skjótt. Og tað er júst tað, sum er hent, og tí hava vit og eftirlønartakararnir vunnið upp á hesa íløgustrategiina, sigur Arnfinnur Gudjónsson, Íløgu- og stjórnardeildarleiðari í LÍV.

LÍV hevur eina eftirlønarskipan, sum er lívslagað til tann einstaka eftirlønartakaranum. Tað merkir, at íløgurnar vera gjørdar við atliti at, hvussu langt tann einstaki kundin er frá sínum eftirlønaraldri. Tað merkir aftur, at avkastið eisini er ymiskt alt eftir, hvussu langt er til eftirlønaraldur (sí talvuna).

Avkastið hjá kundum við marknaðarrentu, sum høvdu ímillum 30 og 0 ár til eftirlønaraldur

| Ár til eftirlønaraldur | 30 | 15 | 5 | 0 |
|---|---|---|---|---|
| **Avkast** | **5,20%** | **5,20%** | **3,80%** | **1,7%** |

*Talvan vísir avkastið hjá kundum við marknaðarrentu, sum høvdu ávikavist 30, 15, 5 og 0 ár til eftirlønaraldur*



*– Samráðingarnar vóru sera truplar, og orsøkin til tað var í høvuðsheitinum krøvini hjá reiðarunum um at fáa gjørt skipanir, sum skuldu gera tað lætt hjá teimum at fara uttan um fakfeløgini í serligum førum, eitt nú í sambandi við áleikandi farsóttina, sigur Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum*

# Føroysku sáttmálarnir komnir til høldar

**Nú eru allir teir heimligu sáttmálarnir hjá Maskinmeistarafelagnum komnir upp á pláss. Teir tríggir við Reiðarafelagið fyri Handilsskip komu til høldar við semju 24. februar**

**Tekstur og mynd**:
Ingolf S. Olsen – PRESS

Tað dróg út at fáa sett sjøtul á samráðingarnar við Reiðarafelagið fyri Handilsskip um teir tríggjar sáttmálarnar, ið eru við hetta felagið – høvuðssáttmálin, sáttmálin fyri tey størru skipini í frálandavinnu og sáttmálin fyri tey smærru skipini í hesari vinnuni.

Men 9. februar blivu krøvini loksins handaðí Vinnuhúsinum. Manningarfeløgini høvdu gjørt av at royna leistin við felags samráðingum enn einaferð. Hóast felags samráðingar, so vóru tær ikki meira felags enn so, at partarnir hvør í sínum lagi øgdu síni egnu krøv fram.

– Trupulleikin við hesum samráðingunum er partvíst, at samráðst verður um ein sera breiðan bólk, har gongdin kann verða rættiliga ymisk, eitt nú hjá farma- vinnuni mótvegis frálandavinnuni. Og so standa vit eisini við tí veruleika, at fallið í norsku krónuni hevur gjørt tað meira lokkandi at flagga yvir. Soleiðis var talan um samráðingar, har tað skuldi trýstast á spidaran og bremsuna í senn, sigur Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Talan um minimumsáttmála, og tí hildu manningarfeløgini, at tað skuldi borið til at fingið nakað lagt omaná sáttmálalønina hjá teimum, sum sigla hjá reiðaríum, har tað gongur gott.

Eftir fyrsta fundin var tó greitt, at krøvini hjá Føroya Fiskimannafelag ikki sampakkaðu serliga væl við tey hjá yvirmannafeløgunum, og tí gjørdu tey av at skekla Fiskimannafelagið burtur úr.

Yvirmannafeløgini settu síðani eina bukett við krøvum saman, sum vóru vald úr rúgvuni av krøvum hjá báðum feløgunum. Tá avtornaði, bleiv ein listi við 11 felagskrøvum sendur til Reiðarafelagið fyri Handilsskip.

Ein fundarrøð bleiv síðani avtalað, soleiðis at tað bar til at røkka á mál, áðrenn sáttmálaskeiðið rann út 1.mars.

Seinasti fundurn var 24. februar, og seint hendan dagin bleiv nýggjur tvey ára sáttmáli undirskrivaður.

- Samráðingarnar vóru sera truplar, og orsøkin til tað var í høvuðsheitinum krøvini hjá reiðarunum um at fáa gjørt skipanir, sum skuldu gera tað lætt hjá teimum at fara uttan um fakfeløgini í serligum førum, eitt nú í sambandi við áleikandi farsóttina. Yvirmannafeløgini høvdu sum so einki ímóti, at okkurt bleiv gjørt í tí sambandinum, men tað skuldi verða ígjøgnum feløgini. Eisini vildu reiðararnir gera tað léttari  at siga fólki upp, at gera yvirtíð upp yvir eitt longri tíðarskeið, og at fáa møguleika at leingja útmynstringartíðina í frálandavinnuni, greiðir Ólavur Gunnarsson frá.

– Hesi krøvini vildhøvdu sjálvandi givið meira í lønarposan, men vit hildu ikki, at vit á nakran hátt kundu ganga nøkrum av teimum á møti, sigur hann.

Endin var undirskrivaða semjan, sum gav eina generella lønarhækking upp á 2,05 prosent fyrra árið og 1,25 prosent seinna árið. Eitt hálvt prosent av hækkingini fyrra árið fer upp á eftirlønina, so hon nú er komin uppá 13 prosent. Umframt hettar bleiv tað til eina øking í viðbótini til einameistarar uppá 232 krónur um mánaðin, og so eydnaðist loksins eisini at fáa yvirtíðarsatsin øktan fimm prosentstig. Hetta kravið er fleiri ferðir áður sett fram, men tá hevur tað verið til fánýtis.

– Vit høvdu sjálvandi fleiri krøv við, sum tíverri ikki vunnu frama hesaferð, men vit gjørdu greitt yvir fyri mótpartinum, at hesi tó á ongan hátt eru gloymd, og verða tey heilt vist sett fram aftur, tá samráðingar verða aftur um tvey ár, sigur Ólavur Gunnarsson.

# Aðalfundur 13. mars

**Aðalfundurin hjá Maskinmeistara-felagnum verður leygardagin 13. mars kl. 14 á Hotel Hilton, Staravegur 13, Tórshavn**

**Skráin er sambært lógini:**

1. Val av fundarstjóra.
2. Frágreiðing formansins.
3. Leggja fram roknskap til góðkenningar.
4. Uppskot um lógarbroytingar.
5. Val av formanni, nevndarlimum og tiltakslimum.
6. Ásetan av limagjøldum
7. Velja skrásettan grannskoðara.
8. Ymiskt.

Tá freistin fyri uppstilling til formans- og nevndarval var úti tann 15. desember 2020, hevði bert Ólavur Gunnarsson, sitandi formaður, stillað upp til formansvalið. Hann er tískil valdur.

Til nevndarvalið eru Regin Olsen og Berit Hovsgarð upp á val. Regin Olsen boðað frá, at hann tekur við afturvali. Onnur valevni til nevndina kunnu skjótast upp á aðalfundinum.

Limir, sum ikki kunnu møta á aðalfundinum, kunnu greiða atkvøðu á skrivstovu felagsins, Grønlandsvegur 58, Tórshavn.

Aftaná aðalfundin verður borðreitt við smurdum breyði og drykkjuvørum.

# TÍÐINDI frá Maskinmeistarafelagnum

**3. desember 2020**
Í fíggjarnevndini til hoyring um uppskot um serstakar treytir fyri fiskiskap eftir makreli, norðhavsild, svartkjafti og botnfiski í Barenshavinum.

**7. desember 2020**
Fundur um ætlan at fáa snurruváskip inn í flotan. Herundir sáttmálaviðurskifti og avrokningarhátt fyri slíkan skipabólk.

**10. desember 2020**
Nevndarfundur í Trygdargrunninum.

**10. desember 2020**
Samráðingarfundur við Polar Seafood og Grønlands Erhverv umvegis Teams platforming.

**14. desember 2020**
Setanarsamrøða við møguligt nýtt skrivstovufólk.

**15. desember 2020**
Setanarsamrøða við møguligt nýtt skrivstovufólk.

**17. desember 2020**
Fundur í Fiskimálaráðnum, har landstýrismaðurin hevði innkallað bólkin, sum gjørdi umsitingarætlanina fyri fiskiskap eftir botnfiski undir Føroyum. Endamálið var, at hann skuldi ráðføra seg við bólkin, og út frá hesum seta í verk kunngerð um fiskidagar fyri komandi árið, og hvussu fiskiskapurin skal skipast framyvir.

**18. desember 2020**
Nevndarfundur. Á skránni vóru trý mál til støðutakan, og kunning um fýra onnur viðuskifti.

**7. januar 2021**
Eftirmetingarfundur av tiltakinum, Sjóvinnuforum. Fundurin varð hildin í Sjóvinnustýrinum.

**20. januar 2021**
Fundur við løgfrøðingar um endurgjaldskravið ímóti North West Pelagic.

**22. januar 2021**
Prógvhandan á Vinnuháskúlanum, har seks maskinmeistarar fingu handað prógv.

**22. januar 2021**
Fundur við hini manningarfeløgini um sáttmálasamráðingarnar við Reiðaríið fyri Handilsskip.

**25. januar 2021**
Nevndarfundur í P/F Fakfelag 26. januar. Nevndarfundur. Á skránni vóru fýra mál til støðutakan umframt kunning um seks onnur viðurskifti.

**26. januar 2021**
Fundur við lønardeildina um arbeiðsviðurskifti á Vørn. Fundurin varð hildin í Portugálinum í Tinganesi.

**27. januar 2021**
Samráðingarfundur við Polar Seafood og Grønlands Erhverv umvegis Teams platforming.

**27. januar 2021**
Fyrireikingarfundur til sáttmálasamráðingarnar við Reiðaríið fyri Handilsskip.

**9. februar 2021**
Handan av sáttmálakrøvum til samráðingarnar við Reiaríið fyri Handilsskip. Fundurin varð hildin í Vinnuhúsinum.

**10. februar 2021**
Fundur í Fiskimálaráðnum. Á skránni vóru møguligar lógarbroytingar.

**15. februar 2021**
Sáttmálasamráðingar við Reiðaríið fyri Handilsskip.

**15. februar 2021**
Nevndarfundur. Á skránni vóru sjey mál til støðutakan umframt kunning um fýra onnur viðurskifti.

**16. februar 2021**
Fundur við LÍV um eftirlønar- og tryggingarviðurskifti.

**17. februar 2021**
Fundur í Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum. Á skránni vóru møguligar broytingar viðvíkjandi inngjaldi á frítiðarkonto - og Frítíðargrunnurin.

**18. februar 2021**
Nevndarfundur í Trygdargrunninum.

**18. februar 2021**
Sáttmálasamráðingar við Reiðaríið fyri Handilsskip.

**19. februar 2021**
Sáttmálasamráðingar við Reiðaríið fyri Handilsskip.

**23. februar 2021**
Fundur um verkætlan viðvíkjandi talgildum plattformi til Sjóvinnuforum.

**24. februar 2021**
Sáttmálasamráðingar við Reiðaríið fyri Handilsskip, sum endaði við, at nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður.




| Navn | Føðingardagur | Bygd/býur | Aldur |
|---|---|---|---|
| Martin Lamhauge | 1/11-1950 | Tórshavn | 70 ár |
| Jóan Magnus Olsen | 4/11-1950 | Vestmanna | 70 ár |
| Jens Eli Johansen | 11/11-1950 | Tvøroyri | 70 ár |
| Petur Ove Vesturtún | 25/11-1950 | Eiði | 70 ár |
| Jóhan við Neyst | 28/1-1951 | Klaksvík | 70 ár |
| Birgir Nicodemussen | 18/3-1951 | Sandur | 70 ár |
| Bergur Álaberg | 5/10-1960 | Argir | 60 ár |
| Jan Erik Klein Olsen | 10/12-1960 | Klaksvík | 60 ár |
| Gudmund Leon Hansen | 19/12-1960 | Miðvágur | 60 ár |
| John Potts | 23/12-1960 | Tvøroyri | 60 ár |
| Jens Andrias Poulsen | 27/12-1960 | Syðrugøta | 60 ár |
| Meinhard Augustinussen | 2/11-1970 | Tvøroyri | 50 ár |
| Adrian Reinert | 1/1-1971 | Tórshavn | 50 ár |
| Ólavur Janussars. Østerø | 19/1-1971 | Tórshavn | 50 ár |
| Mourits Eydunsson | 23/2-1971 | Tórshavn | 50 ár |
| Snorri Jensen | 31/3-1971 | Klaksvík | 50 ár |
| Ólavur Øksnadal | 4/10-1980 | Tórshavn | 40 ár |
| Christian Petur Djurhuus | 22/10-1980 | Tórshavn | 40 ár |
| Karstin Danielsen | 17/11-1980 | Klaksvík | 40 ár |
| Reindolf Yao Delasi Deku | 1/1-1981 | Hoyvík | 40 ár |
| Óli Christian Danielsen | 19/1-1981 | Søldarfjørður | 40 ár |
| Jan Venned | 3/2-1981 | Klaksvík | 40 ár |
| Dávur Kalsø | 4/2-1981 | Tórshavn | 40 ár |
| Jóan Magnus Skoradal | 3/3-1981 | Toftir | 40 ár |
| Magnus Helgi Langgaard | 26/11-1990 | Søldarfjørður | 30 ár |
| Kaj Vilhelm Johannesen | 21/12-1990 | Skáli | 30 ár |
| Niclas Pætur Weihe | 22/1-1991 | Tórshavn | 30 ár |
| Róaldur Jakobsen | 23/1-1991 | Tórshavn | 30 ár |
| Petur Jacob Heinesen | 31/1-1991 | Leirvík | 30 ár |
| Rani Mikkelsen | 6/2-1991 | Kvívík | 30 ár |
| Bogi Álvason Justinussen | 11/3-1991 | Norðragøta | 30 ár |
| Reidar Dahl Joensen | 27/3-1991 | Vágur | 30 ár |



*Anna Hvannastein úr Kaldbak er nýtt skrivstovufólk í Maskinmeistarafelagnum*

# Hanna Hvannastein nýggj á skrivstovuni

**Tekstur og mynd:** Ingolf S. Olsen – PRESS

Á nýggjárinum byrjaði Hanna Hvannastein sum nýtt skrivstovufólk í Maskinmeistarafelagnum.

Hon er 64 ár og býr í Kaldbak. Tað var ígjøgnum ALS-skipanina, at hon kom í samband við Maskinmeistarafelagið, og hon er sera fegin um, at tað eydnaðist henni at fáa fast starv mitt ímeðan korona herjaði upp á tað harðasta.

Anna Hvannastein arbeiddi í tilsamans 25 ár á skrivstovuni hjá MT Højgaard í Føroyum. Hon byrjaði har í 1982, og burtursæð frá einum tíðarskeiði í kreppuárunum í 1990'unum, tá MT Højgaard steðgaði virkseminum her, arbeiddi hon hjá byggisamtakinum til 2012. Síðani var hon hjá 62 Norð í nøkur ár.

Í Maskinmeistarafelagnum fegnast tey um nýggju skrivstovukvinnuna, sum er komin skjótt eftir øllum, sum har er at gera.

Starvið hjá henni í Maskinmeistarafelagnum er hálva tíð, og tað hóvar henni væl.

- Tað er akkurát fyri, tí nú havi eg eisini góða tíð at vera nógv saman við ommudøtrunum, sigur hon.

Anna Hvannastein er gift við Andrias Hvanna-stein, bussførara, og saman eiga tey tríggjar synir og fimm ommu- og abbadøtur.



# Eftirløn

Til eitt langt virkið lív, er gott við
eini persónligari uppsparing.

**Lat okkum hjálpa tær at seta saman**
**títt fíggjarliga trygdarnet.**

liv.fo